

# Verkstaðsleiðari og innkeypari

Av tí at okkara dugnaligi verkstaðsleiðari hevur valt at taka við nýggjum avbjóðingum, verður søkt eftir nýggjum verkstaðsleiðara til nýmótans verkstað kommununar.

**Verkstaður**
Á verkstaðnum, ið er knýtt at sløkkiliðsstøðini, starvast í løtuni seks fólk, ið hava ábyrgd av øllum maskinum og akførum hjá kommununi. Talan er um umleið 100 rullandi eindir.

**Starvið**
Verkstaðleiðarin hevur, umframt rakstrarligu ábyrgdina av verkstaðnum, ábyrgdina av nýkeypi av øllum amboðum og maskinum. Talan er um eina játtan á 6,5 mió. kr. um árið. Til hetta krevst, at tú hevur hug og hegni at samskifta við veitarar, umframt at tú í ávísan mun mást rokna við ferðing, bæði í Føroyum og í Evropa í samband við kunning um nýggja tøkni og útskifting/nýkeyp av amboðum og maskinum.

**Førleikakrøv**
Kommunan roknar við, at tú hevur útbúgving innan bilsmíð, maskinsmíð ella líknandi, hevur førarabræv til akfar yvir 3500 kg og hevur áræði, er arbeiðssamur, opin og hevur góð samstarvsevni. Leiðslu- og samráðingarroyndir eru ein fyrimunir.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og er lønt eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsmannafelag Føroya.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Kartna Jacobsen, sløkkiliðsstjóra á tlf. 302100.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar Kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 23. juli 2007 kl. 12.00.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**

---



Um hóskandi boð fæst

## Eru hús á Oyrabakka til sølu

**Grundstykki:** 1.299 m² til víddar, herav vegur 232 m².
**Hjallarahædd:** 2 hjallararúm við fýrrúmi + 1 baðirúm.
**Miðhædd:** Køkur, stova, kamar, inngongd, alrúm.
**Loft:** 4 kømur, 1 wc
**Byggiár:** 1926. Eru væl røkt
**Áhugað kunnu ringja:** 592134

---

**Frá Barnagarðinum á Teiginum á Sandi:**

# Reingerðarfólk

Vit sóknst eftir einum álítandi reingerðarfólki at gera reint í barngarðinum 20 tímar um vikuna. Starvið verður sett 1. august.

Reingerðararbeiðið fevnir um dagliga reingerð í húsinum á Teiginum og í útibarnagarðinum.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og KAF/Fíggjarmálaðið. Arbeiðstíðin liggur millum kl. 17.30 og 21.30 allar gerandisdagar. Tú fært nærri upplýsingar um starvið við at venda tær til Lailu Marston Petersen, stovnsleiðara á tlf. 361750/212751.

Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum skal sendast til Barnagarðin á Teiginum, Koytugøta 1, 210 Sandur. Freistin at søkja er úti 24. juli. Allir umsøkjarar fáa svar.

# Pedagogur - endurlýsing

Vit sóknast eftir einum pedagogi arbeiða 25 tímar um vikuna í "Miðlon". Børnini í Miðlon eru 2 – 4 ára gomul. Starvið verður sett 1. august.

Talan er um eitt barnsburðarfarloyvisstarv í ½ ár.

**Krøvini til tín eru:**
- at tú er fyrikomandi og erlig/ur
- at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult í samráð við børn og starvsfelagar
- at tú heldur arbeiði við 2 – 4 ára gomlum børnum vera spennandi og avbjóðandi
- at tær dámar at verða úti í øllum veðrið
- at tú dugir at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar
- at tú er nærverandi og dugir at lurta
- at tú vil verða við til at menna barnagarðin og tað arbeiði vit hava sett okkum fyri




Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF/Fíggjarmálaráðið. Arbeiðstíðin er vanliga millum kl. 7.30 og 17.30.
Tú fært nærri upplýsingar um starvið, um tú vendir tær til Lailu Marston Petersen, stovnsleiðara á tlf. 361750/212751.

Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum, skal sendast til Sjálvsognarstovnin Barnagarðin á Teiginum, Koytugøta 1, 210 Sandur. Umsóknarfreistin er úti 24.07.07. Allir umsøkjarar fáa svar.

Sjálvsognarstovnurin
**Barnagarðurin á Teiginum**

---

## Bryggjudansurin

Nú verður hann aftur - -
tann kendi og sera vælumtókti bryggjudansurin hjá Tórshavnar Bátafelag,-
í Vágsbotni 21. juli, kl. 21 - 04.
LM-band spælir okkum sveimandi runt á bryggjuni –
og sjálvandi verða teir sera vælsmakkandi bátabúffarnir aftur á skránni.
Vælkomin í Bryggjudans!

**Tórshavnar Bátafelag**

---

## TILBOÐ

Tilboð ynskist uppá arbeiði at skifta tekju á missiónshúsinum á Tvøroyri, 370 m² úr aluminium.

Nærri fæst at vita um arbeiðið á tlf. 371683 ella 222904 / 224040.

**Vegna stýrið**
Helena Petersen
800 Tvøroyri

---

## Summarfrí

Vegna summarfrí er Sjúkrakassin stongdur frá 16. juli til og við 10. august 2007

**HAVNAR SJÚKRAKASSI**